Skeið í góðskustýring/-trygging innan byggivinnuna

- Lat ikki vantandi stýring forða tær!

Handverksmeistarafelagið skipar fyri skeiði í góðskutrygging. Skeiðshaldari er Símun Hammer, VRG.

Skeiðið er býtt upp í tveir hálvar dagar:

Skeiðsdagur 1:
26. november 2013 - kl. 9:00-13:00

Innihald
Hesin fyrsti skeiðsdagurin inniheldur ein ástøðiligan part og ein praktiskan part, har VRG gevur nøkur dømi uppá góðskustýring-/trygging í gerandisdegnum.

Eisini fer ein fyritøka, sum hevur innført eina nøktandi skipan, at kunna um teirra gerandisdag.

Skeiðsluttakararnir fáa amboð at arbeiða við fram til næsta skeiðsdag.

Skeiðsdagur 2:
6. desember 2013 - kl. 9:00-13:00

Hálvur dagur, sum verður hildin 10 dagar eftir 1. skeiðsdag. Málið er at skeiðsluttakararnir frá 1. skeiðsdegi hava arbeitt við tilfarinum, og møguliga eru komnir nakað ávegis við arbeiðinum.

Innihald
Á hesum skeiðsdegnum verða ivaspurningar hjá luttakandi fyritøkunum tiknir upp. Eisini verður greitt frá møguleikunum fyri sertifisering v.m. av leiðsluskipanum innan góðsku, arbeiðstrygd og umhvørvi.

Skeiðhøli
Skeiðini verða hildin á Hotel Føroyum. Pláss er fyri í mesta lagi 20 luttakarum.

Kostnaður
Luttøkukostnaðurin fyri báðar dagarnar er 500 kr. fyri hvønn persón, íroknað morgunmat og tilfar.

Info og tilmelding
Skeiðið er bert fyri limir í Handverksmeistarafelagnum. Tilmelding fer fram við at senda ein teldupost til felagið á industry@industry.fo. Tilmeldingin er bindandi.

Lær at nýta bestu amboðini innan góðskustýring-/trygging!

Lykilin til atgongd til størri byggi-verkætlanir:

- **Skjalprógvan**
- **Stýring**
- **Trygging av góðsku, trygd og umhvørvið.**